

*Jákup Dahl, próvstur, og H. Ringberg, amtmaður, saman við nøkrum av Føroya prestum uttan fyri kirkjuna á Kirkju í samband við vígsluna 28. mai 1933*
*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

# Føroyar mítt land

Aftur hesa vikuna vóru fimm spennandi evni umrødd í sendirøðini "Føroyar mítt land", sum er á Rás2 hvønn gerandisdag. Sendingarnar hesa vikuna verða savnaðar í eini sending á Rás2 sunnudagin klokkan 13. Innihaldið í teimum fimm sendingunum hesa vikuna var: eitt sindur um lívsleið Símun Jógvanssonar av Glyvrum, sum búsettist í Hoyvík í 1835; um kirkjuna á Kirkju í samband við 75 ára dagin, ið hildin verður sunnudagin 1. juni; um føroyska tjóðbúnan, hesa ferð um vestin; um rutukoyring eftir Oyggjarvegnum tíðliga í sekstiárunum, áðrenn vegurin varð samanbundin á Hórisgøtu; og seinasta sendingin í vikuni, fríggjadagin 30. mai, hevði samband við at henda dagin fyri 100 árum síðani varð Sanatoriið í Hoydølum tikið í brúk. Tey, sum løgdu sendingarnar til rættis hesa vikuna, vóru Ólavur Clementsen, Jenny Lydersen, Nicolina Jensen Beder, Magnus Gunnarsson og Hanus A. Samuelsen.

Rás2, sunnudagin klokkan 13

**Føroyar mítt land í næstu viku:**

2/6 Turið Sigurðardóttir
3/6 Andreas Andreasen
4/6 Nicolina Jensen Beder
5/6 Janus Mohr
6/6 Hanus Kamban

Hvønn gerandisdag kl.8, kl.9, kl.22 og kl.23, (týsdag tó 22.30)

# Rushdie takkar sínum stuðlum

Eftir at rithøvundin Salman Rushdie gav út bókina Satanisku Ørindini 1988, fekk hann ein sonevndan fatwa-dóm hangandi yvir høvdið. Tað var iranski leiðarin Ayatollah Khomeini, sum heitti á einhvønn, sum hevði møguleikan til tað, at gera av Rushdie. Á einari bókastevnu í Wales nú um dagarnar tosaði Salman Rushdie um truplu árini við hóttandi deyðadóminum.

- Eg varð noyddur at skilja, hvat tað var, sum eg stríddist ímóti, og hvat eg stríddist fyri, segði Rushdie, sum takkaði teimum mongu, sum høvdu hjálpt honum og stuðlað honum í truplu tíðini.



Sosialurin